# Fólk til móttøkuna á Sjómansheiminum í Reykjavík

Søkt verður eftir fólki til móttøkuna á Sjómansheiminum Ørkin, Reykjavík, at byrja 2. jan. 2006.

**Starvið í móttøkuni umfatar m.a.:**
- ábyrgd av inn- og útbóking av gestum
- taka ímóti bíleggingum og svara fyrispurningum
- útskriva og senda ordraváttanir og fakturar
- vegleiða og hjálpa vitjandi
- taka sær av øllum fyrifallandi arbeiði á heiminum

**Førleikakrøv:**
Vit rokna við, at tú:
- ert persónligur kristin og tekur undir við grundarlagnum hjá Sjómansheiminum og Sjómansmissiónini
- ert álítandi, fyrikomandi, sjálvstøgug/ur og hevur samstarvsevni
- kanst samskifta á enskum, og hevur áhuga at læra íslendskt.

**Løn og setanarviðurskiftir:**
Løn og setanarviðurskiftir eftir avtalu.
Skrivlig umsókn, saman við viðkomandi skjølum, skal verða stýrinum í hendi í seinasta lagi 18. november 2005

**Stýrið fyri Sjómansheimið Ørkina í Reykjavík,**
Árni Jacobsen, form.
Millum Svalir 3,
520 Leirvík

Upplýsingar um starvið fáast við at ringja til Árni Jacobsen, tel. 443265,
ella Ásbjørn Jacobsen tel. 283177

Tel: +354 568 0777. Fax: +354 568 9747
t-postur: orkin@simnet.is www.hotel-orkin.com

*Sjómansheimið Ørkin í Reykjavík er knýt at Hini Føroysku Sjómansmissiónini. Heimið, ið var tikið í nýtslu 1991, hevur 20 dupultkømur, matarhøli, fundarhøli o.a. liggur mitt í býnum. Umframt føroyingar vitja eisini Íslendingar og aðrir útlendingar heimið. Hvørja viku eru møtir og onnur tiltøk á Føroyska Sjómansheiminum. Dentur verður lagdur á eitt kristiligt heim við góðari tænastu í rúsfríum umhvørvi. Roynt verður at hava so nógv Føroysk starvsfólk sum gjørligt.*

# Lærugreinaráðgevi í føroyskum

## fyri vinnu-, miðnáms og hægri útbúgvingar

**Starvið**
Í Landsmiðstøðini er eitt starv sum lærugreinaráðgevi í føroyskum fyri vinnu-, miðnáms- og hægri útbúgvingar leyst at søkja til setanar frá 1. januar 2006.

Talan er um eitt fjølbroytt og áhugavert starv, har lærugreinaráðgevin í samstarvi við avarandi partar m.a. skal:
- virka fyri fagligari og námsligari menning í lærugreinini føroyskt
- ráðgeva viðvíkjandi undirvísingarmiðlum og arbeiðshættum í lærugreinini
- ráðgeva og vegleiða í fakligum spurningum og fremja fakligar eftirmetingar
- hava leiðsluna av skrivligu uppgávunevndunum í føroyskum á vinnu- og miðnámsskúlunum
- vera Próvstovuni til hjálpar í ymiskum høpi
- luttaka í verkætlanum, serliga á tí námsfrøðiliga økinum og innan KT

Lærugreinaráðgevin skal tryggja, at nevndu uppgávur verða loystar á einum høgum fakligum stigi, og at mannagongdirnar eru í samsvari við nútímans krøv.

Ráðgevin skal, umframt omanfyri nevndu uppgávur, eisini vera til reiðar at átaka sær aðrar uppgávur í Landsmiðstøðini

**Førleikakrøv**
Vit vænta okkum m.a., at umsøkjari hevur
- kandidatprógv frá universiteti við prógvi í føroyskum
- verkliga og ástøðiliga námsfrøðiliga útbúgving
- undirvísingarroyndir á miðnámsstigi
- áhuga fyri námsfrøðiligum arbeiði og fyri nýtslu av KT í undirvísingarhøpi
- góð samstarvsevni og hug at arbeiða í bólkum
- førleika at menna samstarvið við starvsfelagar, stovnar, lærarar og áhugafelagsskapir
- vera ein virkin partur av toymisumhvørvinum í Landsmiðstøðini og samstundis kunna arbeiða sjálvstøðugt
- áhuga fyri avbjóðingum og vilja til at royna nýggjar leiðir

**Vit bjóða**
- eitt spennandi starv við skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti inn- og úteftir
- arbeiði á einum høgum fakligum stigi og góðar møguleikar fyri bæði persónligari og fakligari menning

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Setanartíðin fyri lærugreinaráðgevan er í fyrstu atløgu 3 ár. Síðani kann setanartíðin verða longd tvær ferðir við tveimum árum hvørja ferð. Um serlig viðurskifti tala fyri hesum, kann setanartíðin longjast út yvir 7 ár.

Arbeiðstíðin í ráðgevastarvinum er 2/3 av fullari arbeiðstíð. Tann, ið settur verður, skal undirvísa írestandi tímarnar í einum vinnu- ella miðnámsskúla, tó í mesta lagi svarandi til 1/3 starv.

**Umsókn**
Umsóknir við prógvum, c.v. o.ø. skulu verða Landsmiðstøðini, Hoyvíksvegur 72, Postrúm 3084, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mikudagin 23. november 2005.

Gjøllari upplýsingar fáast frá Petur Simonsen, stjóra á Landsmiðstøðini, tlf. 318825.

*GG! Starvið er treytað av játtan á Løgtingsins Fíggjarlóg.*

**Landsmiðstøðin**

***Landsmiðstøðin** er tænastustovnur í undirvísingarverkinum, sum m.a. sýnir fram og lænir út undirvísingarmiðlar, hevur verkstaðarmøguleikar, hevur saman við Mentamálaráðnum eina lærugreinaráðgevaskipan og skipar fyri skeiðum við fakligum og námsligum innihaldi.*

# Skattalistin fyri 2004

Skattalistin fyri Runavíkar kommunu liggur frammi til alment eftirlit í tíðarskeiðinum frá 14.-25 . november 2005, báðir dagar íroknaðir.

**Runavíkar Kommuna**

**Eysturoyar Røktar- og Ellisheim**
**620 Runavík**

**Søkt verður eftir**

# Fysioterapeuti

**1,00 tíð frá 01.01.06 at rokna**

Løn sambært galdandi sáttmála.

Skikkaður umsøkjari er til starvið.

Umsókn saman við prógvi v.m. skal verða komið til heimið í seinasta lagi 23.11.05 kl. 12.00.

Nærri starvinum viðvíkjandi fæst at vita frá fyristøðumanninum á tlf. 448185 ella 448201.

# "Fiskur hevur stert"

– hevur hann nú tað?

**Týsdagin 15. november kl. 19.30 skipar Fiskirannsóknarstovan fyri fyrilestrum í hølunum hjá Tvøroyrar Klubba við hesi skrá:**

- Æti í sjónum og fiskur
- Føði og ferðing hjá toski
  – hví er veiðan við línu so ójøvn?
- Steðgur við kaffi/te
- Lutakast um 10.000 kr millum innsend fiskamerkir
- Atburður hjá fiski mótvegis reiðskapi

**Øll eru vælkomin.**

Fiskirannsóknarstovan

Sosialurin 341800

**Arbeiðshandskar**
til øll endamál - bæði á sjógvi og landi
Beinleiðis frá framleiðara
**Landsins størsta úrval**
frá eingangshandskum til fóðraðar Japan-handskar
**ADC-Heilsølan** spf
Láarvegur 14 • 100 Tórshavn • Tel. 315828 • Fax 315893
adc@adc.fo
Sosialurin 311820